tíðindablaðið
sosialurin
frælsi
javnaður
brøðralag

Nr. 143 ★ týsdagur 6. desember 1988 61. árg. ★ Kr. 6,00

Vit geva tær eitt tónarkt lív
Høgni Andreasen
Radio & Musikkhandil
Smyrilsvegur 6
Tlf. 19060

Javnaðarflokkurin í Klaksvík átalar:

Kennir frekleiki fólkafloksins als einki mark!

— tá tað snýr seg um at brúka borgarans pening, spyrja tvey av valevnum javnaðarfloksins til býráðið í Klaksvík í samband við at fólkaflokkurin brúkar Klaksvíkar kommunu til sítt egna valstrið.

Fyri fleiri ferðir 10.000 kr. hava borgarar í Klaksvík nú uppundir jól goldið fyri at senda tekningar v.m. í hvørt hús í kommununi av Miðbýarætlanini. Hvussu leingi skulu danskar teknistovur og teirra føroyska viðhang halda á við at mjólka kommunukagganum upp í saman og í áravís?

Henda ætlan, sum fleiri ferðir hevur verið frammi í fjølmiðlum og á útstillingum bæði her heima og uttanlands, verður nú send í hvørt hús í kommununi, sum ein annar prislisti frá dønskum vøruhúsi. Har verður nú kravt, at tann, ið ynskir at verða við í Miðbýnum, skal hava sent umsókn í seinasta lagi 15. januar 1989, og hetta hóast fulfiggjað og skilagóð umsókn liggur frá Keypssamtøkuni, sum bjóðar sær til at figgja handilsmiðdepulin, men hesum hevur fólkaflokkurin við sínum samgongupartnarum havnað.

Men her beint uppundir jól skulu kvinnur og menn finna út av, um tey vilja verða við. Ein góðan mánaða, og mitt í øllum jólastákinum, fáa tey nú til at finna út av, um figging fæst til slíkt. Støðan er heldur tann, at aftaná at kommunan hevur nýtt hópin av peningi til at lata fleiri dønsk feløg finna út av, hvussu vit skulu innrætta okkum í Klaksvík, er ikki ein einsata seriøs umsókn til hetta glansbílætið, uttan Keypssamtøkan, og tað hóskar ikki til fólkaflokkin.

Okkara limur í Miðstaðarnevndini Simun Petur Hjelm kennir onki til alt hetta, tí kann tað bert verða fólkaflokkurin og Olvheðin Jacobsen (hann sum var ímóti Miðbýarætlanini), ið hava tikið hesa avgerð um at set freistina til 15. januar.

Fólkafloksreklama

Alt hetta hevur bert eitt endamál, og tað er valpropaganda fyri fólkaflokkin, og halahang hansara Olvheðin Jacobsen.

Framhald á síðu 6

Óli E. Heinesen, býráðslimur,


Simun Petur Hjelm, lærari,



Eisini í Havn ger fólkaflokkurin sær dælt av, at hann situr við valdinum. Í blaðnum, sum hann hevur sent í hvørt hús, verður búmerkið hjá Havnini — øllum borgarum í høvuðsstaðnum, brúkt sum búmerki hjá fólkaflokkinum. Hvør skal siga, Tórshavnar kommuna tað er fólkaflokkurin.

Miðbýurin í Klaksvík

Soleiðis rekur fólkaflokkurin valstrið. Í seinasta nummarinum av Norðlýsinum hevur fólkafloksmaðurin Jógvan við Keldu heilar fýra síður, sum snúgva seg um Miðbýarætlanina. Hetta skal sýnast at vera upplýsandi tilfar, men er í veruleikanum einki minni enn valpropaganda fyri fólkaflokkin

Ann Mikkelsen sigur ósatt um býlingshúsini

Frítíðarvirksemi er ikki í býlingshúsunum

Í valblaðnum hjá Fólkaflokkinum í Havn, skrivar Ann Mikkelsen, eitt av valevnunum, um alternativa barnaansing.

Ann hálovar har býlingshúsunum, tí tann skipanin er meira liðilig. Hon skrivar, at býlingshúsini ikki bert eru til barnaansing í vanligari merking, men eisini til smá skúlabørn, til ungdóm og tey vaksnu í býlinginum.

Greinin hjá Ann er fallin fleiri fólkum, ið hava ringt til Sosialin, fyri bróstið, tí býlingshúsini verða bert nýtt til at ansa børnunum undir skúlaaldur, og alt bendir á, at tey aldrin verða til annað.

Tá ætlanin við býlingshúsum á sinni varð kunngjørd, gjørdu pedagogar og onnur beinan vegin vart við, at tað ikki ber til at hava alt virksemið undir einum, av tí einfoldu orsøk, at rúm er ikki fyri meira enn barnaansing.

Ann Mikkelsen skrivar, at býráðið *hevur* tilboð í býlingshúsunum til tey smáu skúlabørnini, sum kunnu vera í býlingshúsunum aftaná skúlatíð til eitthvørt spæl.

Hetta er beinleiðis ósatt. Býlingshúsini virka øll sum barnagarðar og vøggustovur burturav, sigur ein lesari.

Tað er eisini ósatt, at tey 11 til 17 ára gomlu kunnu fara í býlingshúsini at telva, spæla kort, dansa o.a., sum Ann Mikkelen skrivar. Tað er heldur ikki satt, at tey vaksnu kunnu nýta býlingshúsini sum eitt slag av bygdarhúsi at koma saman í.

— Ann Mikkelsen býr sjálv í býlingi við býlingshúsi. Tað er nógv fyri at siggja, at hon kemur sær at stiga frma í valblaði Fólkafloksins og siga so ósatt, tí hon veit betur. Tað er ikki serliga dámligt av henni at nýta býlingshúsini, sum ikki svara til lyftini, til at hjálpa Fólkaflokkinum í Havn, sigur eitt foreldur, sum býr í einum býlingi í Havn.

Veteranar í hornatøkum: Jógvan Martin Mørk og Richard Johansen í 5. deildar dystinum ímillum Neistan og StÍF, sum strandingar vunnu 17—18.

Orsakað av tilfari í sambandi við bý- og bygdaráðsvalini er hondbólturin frá mikudegnum við í blaðnum í dag; ítrótturin frá vikuskiftinum verður í blaðnum hósdagin ella í einum møguligum eykablað í morgin.

Blaðstj.